# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Olina Lervig 90 ár



Sunnudagin 4. desember fyllir Olina Lervig, Lina hjá Petur á Regni, úr Leirvík, 90 ár. Hon heldur føðingardagin á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi í Runavík millum kl. 15-18, har høvi verður at heilsa upp á føðingardagsbarnið.

Olina Lervig, f. Eliassen 4. desember 1915, er dóttir Josefinu og Elias Eliassen í Leirvík. Í barnaárunum búðu tey inni á Toftanesi. Tey vóru 5 systkin, tríggjar systrar og tveir beiggjar. Av teimum hevur Olina nú bert tað yngru systrina Margrethu sum býr í Saltnesi. Lina kom sum ung genta til trúgv á Harran og hevur víst hetta í bæði orðið og lívið.

5. november 1938 giftist Lina við Peturi Lervig, vanliga nevndur Petur á Regni.

Saman fingu tey børnini: Elias, Herfríð, tvíburarnar Káru og Jógvan, og til síðst Jonnu og Páll. Synirnir eru búsitandi í Leirvík, meðan døturnar búgva í Tórshavn og Danmark. Síðani eru komin 18 barnabørn, 32 langommubørn og 3 oldurommubørn.

Olina og Petur høvdu eitt langt lív saman, og høvdu tey tað gleði, at halda teirra gullbrúdleypsdag í 1988. Eftir hetta fekk Petur bert tvey ár afturat, 26. august flutti Petur heim til sín Harra og Frelsara, sum hann so trúliga tænti og vitnaði um.

Heimið hjá Olinu og Peturi var merkt av teirra gestablídni. Har búðu mangir gestir, m.a. trúboðarar sum komu at vitja brøðrasamkomuna í Leirvík, tað vóru bæði føroyingar og útlendingar. Eisini tá Petur kom heim við avbygdamonnum frá útróðri við »Aldubáruni«, sum hann átti og førdi, har hann ynskti at vísa teimum gestablídni, kundi hann altíð líta á, at Lina var klár við døgurða, nýbakaðum køkum og einum deiligum drekkamunni. Hetta megnaði hon sera væl við sínum stillføra framferðarhátti.

Tá eg kom til Leirvíkar at vitja fyrstu ferð, má eg siga, at eg føldi meg ómetaliga vælkomnan, og blíðskapurin var stórur. Eg vil á henda hátt takka Linu fyri alt tað hon hevur verið fyri meg, børn og barnabørn okkara. Lina, sum í dag býr á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimið, hevur enn í dag, tann góða eginleika, at hon altíð er í góðum hýri og kann fáa øll at flenna.

Eg vil við hesum ynskja vermóður míni hjartaliga tillukku við 90 ára føðingardegnum og Harrans ríku signing í framtíðini.

**Olav Askildsen**

## Gabriel og Jolina gullbrúdleyp

**MERKISDAGUR**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Í dag, 3. desember, hava hjúnini, Gabriel og Jolina Hansen í Nólsoy, gullbrúdleyp.

Borðhaldið, har dekkað er til 250 fólk, verður á flakavirkinum úti undir Klivum, og síðan verður kaffi og dansur í Royndarhúsinum.

Gestirnir fáa fekst lambskjøt, suppu og risalamande, og nógv er gjørt burtur úr, at fólk skulu føla seg væl.

Gabriel og Jolina eru tvey kend andlit í Nólsoy. Vit kunnu av røttum siga, at tey eru ein fastur táttur í bygdamyndini, nú tey bæði eru farin um tey sjeyti.

Tey hava havt handil í mong ár, fyrst í kjallaranum, har tey búgva, og fyri longu nógvum árum síðan lótu tey nýggjan og stóran sjálvtøkuhandil byggja úti á Nýggjaveg.

Gabriel hevur eisini umboðað Statoil í Nólsoy í fleiri ár.

Vit kunnu siga, at handilsvinnan lá í blóðinum, tí forfedrarnir høvdu handil og fiskakjallara, har bátafiskur varð saltaður til útflutnings.

Vit ynskja Gabriel og Jolinu við familju ein góðan gullbrúdleypsdag, nú tey hava staðið saman sum hjún í samfull fimti ár.

### 90 ára føðingardagur

Sunnudagin 4. desember verður Olina Lervig, Lina hjá Petur á Regni, úr Leirvík, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi í Runavík frá kl. 15.00-18.00, har høvi verður at heilsa uppá føðingardagsbarnið.

### 75 ára føðingardagur

Leygardagin 3.des. fyllir Mads W. Hentze í Skopun 75 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni, hjá dóttrini í Mækjugøtu 6 í Havn.

### 70 ára føðingardagur

Mánadagin 5. desember verður Knúd-Erik Andersen, Toftir, 70 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin fyri familjuni.

### 50 ára føðingardagur

Leygardagin 3. desember verður Jákup Rein-ert Hansen, sóknarprestur, ph.d., á Sandi 50 ár. Føðingardagin verður opið hús í Todnesi millum kl. 10.00 og 14.00.

### Krúndiamantbrúdleyp

Mánadagin 5. desember kunnu hjúnini Signa og Søren Jacob Lamhauge, Rituvík, hava krúndiamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Sjómansheiminum sunnudagin 4. desember kl. 14.00.

### Gullbrúdleyp

Leygardagin 3. desember hava Karin og Jacob Norðberg, Hvalba, gullbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða okkum, eru vælkmin inn á gólvið frá kl. 13.00-17.00 í heiminum hjá Anna-Britt og Martin Eið í Hvalba.

### Brúdleyp

Leygarmorgunin 3. desember kl. 8.00 giftast í Sjóvar kirkju, Fía Alisa Poulsen, Innan Glyvur og Karl Magni Hammer, Toftir. Móttøka verður á Svangaskarði frá kl. 10.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 3. desember giftast í Kelduni í Skálafirði Tóra Hansen, Skálafirði og Martin Frederiksberg, Strendur.

### Silvurbrúdleyp

Mánadagin 5. desember hava hjúnini Katrin og Jógvan Karl Joensen í Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima, Undir Klakki 30 frá kl. 17.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

### Gullbrúdleyp

Leygardagin 3.dec. kunnu hjúnini Ragna og Torvald Joensen, Norðragøtu, hátíðarhalda gullbrúdleypsdagin. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### Prógv

Í november varð Anna Kirstin Hansen úr Havn útlærd sum frisør á salongini ”Klippestuen” á Frederiksberg.

Fróði Bjarkason Skúvadal hevur á Københavns Universitet tann 20. oktober lokið prógv sum cand. scient. í lívfrøði.